VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Hvassur vindur ella skrið av norði og útnyrðingi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið leygardagin:
Hann minkar vindin niður í andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk av útsynningi og regn. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi ella av ymsum ættum og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 12 og 15 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig. Týsdagin minni vindur av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

Nú sleppa tey at ferðast

Stuðulskonsertin, sum varð hildin á Platform seinasta fríggjakvøld, gav eitt gott ískoyti til danmarkarferðina hjá føroyskum, kreftsjúkum børnum. Allur innkomni peningurin fór óskerdur til endamálið

STUÐULSKONSERT

Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Seks ára gamla Elsebeth Kristina, dóttir Mourits Mohr Vang, tekur her ímóti kekkinum frá Peturi. Nú sleppa 8 familjur ein hugnaligan túr til Danmarkar
Mynd: Jens Kr. Vang

Hósdagin 26. august kundu fyrireikararnir av Danmarkarferðini fyri kreftsjúku børnini leggja 44.830 kr. afturat ferðapeninginum. Hetta var nevniliga upphæddin, sum kom inn, tá stuðulskonsertin var hildin á Platform, seinasta fríggjakvøld.

Petur Olsen, partaeigari av Platform, sigur, at man nú bara kann iðra seg um, at prísurin á atgongumerkjunum ikki var hægri.

– Áhugin fyri konsertini var sera stórur, og øll atgongumerkini vóru longu útseld í forsøluni, so fyri tað kundi prísurin verið hægri, sigur hann.

Hann sigur, at hetta samstarvið kom í lag, tá Mourits Mohr Vang setti seg í samband við hann.

– Eg havi einaferð siglt saman við Mourits, og tá hann nú spurdi, um vit vóru áhugaðir í at stuðla hesum tiltakinum, vóru vit klárir beinanvegin. Eg visti, at hann hevur eina dóttir við kreft, sum ofta er niðri á ríkissjúkrahúsinum. Nú vildi hann skipa fyri eini ferð fyri hesum sjúku børnunum, sum skuldi vera stuttlig. Hon skuldi ikki snúgva seg um sjúku, læknar og sjúkrahús. Eg helt, at tað var eitt fínt hugskot, greiðir Petur frá.

Tað gingu einir tveir mánaðir frá tí, at Mourits av fyrstan tíð setti seg í samband við Petur, og til konsertin varð hildin. Alla tíðina var samstarvið tætt teirra millum. Mourits setti seg sjálvur í samband við allar tónleikararnar, og teir vóru allir til dystin fús beinanvegin.

– Alt hevur gingið ótrúliga væl, og øll hava verið skjót at hjálpa. Bæði tónleikarar, sum hava nógv at gera, men sum hóast tað settu hetta kvøldið av til konsertina, og miðlarnir, sum hava lýst ókeypis og stuðlað á tann hátt. Vit høvdu bert hølini, og vit hava avgjørt ikki nakra størri æru av væleydnaða tiltakinum, enn hini, sum hava stuðlað, sigur Petur.

Hann sigur, at teir í Platform eru sera glaðir fyri tiltakið, og at tílík góðgerandi endamál avgjørt fara at verða á skránni aftur í náttklubbunum í Havn.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	4
Qaqortoq	9
Ammassalik	6
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	12
Lerwick	14
Aberdeen	13
London	17
Tromsø	11
Bergen	16
Oslo	–
Stokkhólm	17
Keypmannah.	19
Helsinki	13
Moskva	18
Berlin	19
Warzawa	22
Kiev	23
Bukarest	25
Paris	18
Madrid	30
Róm	28
Malorca	31
Athen	–
Malta	29
Tunis	41
Beijing	28
New Dehli	30
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	21
New York	23
Miami	30
Los Angeles	22
Meksikobýur	22
Panama	–
La Paz	8
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	17

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 1006 hPa. í útsynning úr Íslandi kemur hendavegin og dýpist nógv. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.



Djúpa lágtrýstið eystan fyri Føroyar fer spakuliga í landnyrðing og grynnist. Tað hevur eitt skifti nógvan høgættavind við sær á okkara leiðum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 25/08 kl. 06⁰⁰–26/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: <0,1 mm – mált frá 25/08 kl. 06⁰⁰–26/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 31,2 mm

VESTFALLSKYRRINDI

23. aug.: Fyrra kvarter
27. aug.: Mánin næstur jørðini
30. aug.: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
27. aug	04.55	17.23	03.55	16.23	04.10	16.38	06.55	19.23	07.55	20.23	03.10	15.38	02.10	14.38	05.10	17.38	06.10	18.38	04.40	17.08	05.55	18.23
28. aug	05.51	18.19	04.51	17.19	05.06	17.34	07.51	20.19	08.51	21.19	04.06	16.34	03.06	15.34	06.06	18.34	07.06	19.34	05.36	18.04	06.51	19.19
29. aug	06.47	19.11	05.47	18.11	06.02	18.26	08.47	21.11	09.47	22.11	05.02	17.26	04.02	16.26	07.02	19.26	08.02	20.26	06.32	18.56	07.47	20.11
30. aug	07.36	20.00	06.36	19.00	06.51	19.15	09.36	22.00	10.36	23.00	05.51	18.15	04.51	17.15	07.51	20.15	08.51	21.15	07.21	19.45	08.36	21.00

5 707265 100050 >